# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# SEV gjørt sáttmála um Eiði 2

**Seinnapartin í gjár skrivaðu leiðslan í SEV og leiðslurnar í MT Højgaard Føroyar og J & K Petersen Contractors undir ein sáttmála, sum setir skjøtil á Eiði 2**

ORKUÚTBYGGING

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Nýggi stjórin á SEV, Hákun Djurhuus, hevur longu sitið við borðið og verið við til at gjørt fyrstu avtaluna fyri SEV, sjálvt um hann ikki tekur við fyrr enn ársskiftið.

Talan er um byggisáttmála av norðara parti av Eiði 2, sum sambært sáttmálanum kostar 44,4 milliónir krónur. Arbeiðið fer í gongd fyrst í komandi ári, skrivar SEV í tíðindaskrivi.

Norðari partur av Eiði 2 fevnir um at leingja tunnilin, sum gongur úr Eiðisvatni suður um Norðskálatunnilin vestarumegin á Eysturoynni. Tunnilsstrekkið úr Eiðisvatni gongur sum er 6,6 kilometrar suðureftir, og tað skal leingjast 2,5 kilometrar upp í 9,1 kilometrar. Tunnilin endar sostatt í fyrstu atløgu ein hálvan kilometur sunnan fyri munnan á Norðskálatu nlinum. Sáttmálin fevnir eisini um at gera ein vegatein oman til eitt arbeiðspláss skamt niðan fyri munnan á Norðskálatunlinum.

Tá norðari partur av Eiði 2 er liðugur, verður mett, at framleiðslan á Eiðisverkinum økist 10 prosent - úr 40 milliónum kilowatt-tímum upp í góðar 44 milliónir kilowatt-tímar um árið.

Seinni er ætlanin at halda fram at bora tunnilin níggju kilometrar afturat suður til Selatraðar, um Yvirfriðingarnevndin gevur loyvi til tað, tá árinskanningarnar eru gjørdar.



*Leivur Hansen, stýrisformaður í SEV, skrivar her undir byggisáttmála um Eiði 2. Hetta hendi seinnapartin í gjár. Tað verða MT Højgaard Føroyar og J & K Petersen Contractors, sum í felag gera verkætlanina*

**KOMST TÚ IKKI INN Á PEDAGOGÚTBÚGVINGINA?**
**TÚ KANST ENN NÁA TAÐ!**

**Far undir tína dreymaútbúgving í februar ella august – og til eina bíliga leigu í Århus.**
**Komið tann 3. desember kl. 19.30 í Miðlahúsið í Tórsgøtu 1**
**har cand. theol. Jens Maibom Pedersen, fyristøðumaður á Diakonháskúlanum, heldur eitt upplegg um útbúgvingarnar á háskúlanum saman við Beintu Joensen, sum hevur tikið útbúgving á skúlanum.**
**Øll eru vælkomin.** Vit borðreiða við kaffi og smákøkum.

**Tann pedagogiska diakonútbúgvingin:**
**Diakonur:** Pedagogútbúgving við siðalæru, religiónspedagogikki og sálarrøkt. Hópur av áhugaverdum møguleikum fyri starvsvenjing. Viðurkend av yrkisfeløgum ájavnt við vanliga pedagogútbúgving.
**Útbúgvingin gevur rætt til danskan SU. Í løtuni er lestrarstuðulin 6503 kr. um mánaðin.**

**Tann diakonala eftirútbúgvingin:**
**Ársskeiðið:** Gev tíni útbúgving ein diakonalan profil. Fakliga uppkvalifisering og persónliga menning.

***Kostnaður um mánaðin: 4580 kr. Íroknað undirvísingargjald, egið verilsi við wc og baðirúmi og seks máltíðir um dagin.***
Diakonútbúgvingarnar eru í kveikjandi háskúlaumhvørvi við kristnum felagslívi.



*Jens Maibom Pedersen*



*Beinta Joensen*

**Tlf. (0045) 8627 4122**
**www.diakonhojskolen.dk**

